# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### 80 ára føðingardagur

1. apríl verður Gunhild Joensen í Nólsoy 80 ár. Dagurin verður hildin í Roynarhúsinum frá kl. 15.00-19.00.

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 2. apríl fyllir John C. Johannesen, Tórshavn, 85 ár. Hann verður at hitta í heiminum Dalatún 8, frá kl. 15.00-19.00.

## 410 mál um vegskattaeftirstøður

TÍÐINDASKRIV

Bileftirlitið hevur latið politistøðunum kring landið 410 mál um vegskattaeftirstøður, til at taka nummarspjøldrini av akførum, sum enn ikki hava goldið vegskatt fyri fyrra hálvár 2005.

Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Bárður Jákupsson í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV



Fríggjadagin 1. februar kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Bárður Jákupsson upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Við á framsýningini eru 20 málningar og 10 akvarellir. Bárður Jákupsson hevur verið sera virkin, at skriva greinar og bøkur um føroyska list og soleiðis gjørt føroyska list kenda í útlondum.

Í bókini "Myndlist í Føroyum 2000", sigur Peter Michael Hornung um Bárð Jákupsson: Málningalist hansara kenst av einum hugburði til litir, ið er knýttur at vøkstri og grøði í teirri sansaðu náttúruni, og fríari og rytmiskt livandi pensilsskrift, sum - stílistiskt og grafologiskt - eyðkennir bæði listamansins mensku megi og fína musikalitet. At kalla Bárð Jákupsson abstraktan hevði verið tað sama sum at avdúkað tørvandi kunnleika til teir náttúrurunnu formar og litir, ið umgeva hann í gerandisdegnum, og sum staðiliga geva honum íblástur, sjálvt tá ið hann hevur teir ikki fyri eygunum í málaraverkstaðnum, framman fyri myndafótinum. Og at rópt hann modernist hevði verið at skúgvað til viks hansara samskifti við málningsins ástøðiligu framburðsmøguleikar.

Bárður Jákupsson er ekspressionistur eftir náttúrunnar treytum, og hann kennir sum fáur møguleikan hjá pensilsstrokunum til at tala við kalligrafiskum máli, til bæði at sleppa tí gamla heiminum og avdúka ein nýggjan. Tvey sløg av náttúru møtast í listini hjá Bárði Jákupssyni: málningsins náttúra - og Føroya, og tær eru felags um at vera í sterkari rørslu og støðugari broyting.

Framsýningin verður opin til 15. apríl, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Fyri 25 árum síðan:

# William Heinesen heiðursborgari í 1980

**12. mars í 1980 fekk William Heinesen (1900-1991) handað heiðurstekin handað frá táverandi borgarstjóranum í Havn, Petur C. Christiansen, í sambandi við at hann av Tórshavnar býráð varð útnevndur til heiðursborgara.**



*William Heinesen fær handað heiðurstekin frá borgarstjóranum í Havn, Petur C. Christiansen*

*Kelda: Árið ið fór 1980*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin